## Føroyska arbeiðið í Eliaskirkjuni 25 ár

**Vikuskiftið 7. og 8. oktober fara føroyingar í Keypmannahavn at hátíðarhalda, at 25 ár eru liðin síðani kristiliga arbeiðið byrjaði**

TRÚARLÍV
*Snorri Brend*

25 ár eru nú liðin síðan byrjað varð við Føroyska arbeiðinum í Eliaskirkjuni.

Arbeiðið byrjaði í 1980 við at nøkur lesandi komu saman til bíbliutímar í heimunum hjá hvør øðrum.

Árið eftir varð arbeiðið víðkað til eisini at umfata møti í Eliaskirkjuni annaðhvørt leygarkvøld og frá 1989 hevur møtið, sum er høvuðstiltakið, verið hvørt leygarkvøld.

Í 1992 var byrjað við sunnudagsskúla á Oyrasundskollegi'inum og umframt hetta verður eisini skipað fyri m.a. andaktum á Hotel Tórshavn, heystlegu og evnisdøgum.

Eisini hevur arbeiðið eina heimasíðu har kunnað verður um arbeiðið og tey ymisku tiltøkini, sí www.eliaskirkjan.dk

Føðingardagurin verður hildin við veitslu fríggjakvøldið 7. oktobur kl. 19 og einum møti leygarkvøldið 8. oktober kl. 19.

- Øll hesi árini hava nógvir føroyingar havt sína gongd í Eliaskirkjuni og á ymiskan hátt tikið lut í arbeiðinum. Vit vóna tí at síggja nógv av teimum aftur til hátíðarhaldið, siga fyrireikararnir.

## Vøllurin í Nólsoy skal gerast liðugur

**Tað nyttar lítið at spæla fótbóltsdyst í Nólsoy, tá spælararnir kunnu verða undiroystir í brimbrotum mitt undir dysti**

BÓLTSPÆL
*Snorri Brend*

**Nólsoy:** Hetta ætlar Tórshavnar kommuna sær nú at bøta um, soleiðis at hesin graslíkisvøllurin kann gerast endaliga liðugur.

Seinasta ár keypti táverandi Nólsoyar kommuna graslíki, og hevur kommunan longu brúkt 1,8 mió. kr. uppá vøllin. Enn vantar at gera undirlendið og girðingina lidna.

Hinvegin er eisini neyðugt at hækka verjugarðin móti brimi sum skjótast, meðan ein kann koma framat hesum, uttan at skula gera skaða á vøllin og girðingina.

Nú hevur býráðið so samtykt at gera vøllin lidnan – eitt arbeiði sum kemur at kosta um 1 mió. kr.

## Kirkjuliga Missiónsfelagið ársmøti

TÍÐINDASKRIV

Ársmøtið hjá Kirkjuliga Missiónsfelagnum verður í Missiónshúsinum við Landavegin í Havn í døgunum 22.-25. september.

Høvuðstalari verður Hans Erik Nissen úr Danmark. Hann var í mong ár fyristøðumaður á Luthersk Missionsforenings Højskole í Hillerød, har fleiri føroyingar hava gingið.

Byrjað verður hóskvøldið kl. 20 við møti. Hildið verður so fram fríggjadagin kl. 16 við bíbliutíma. Kl. 20 fríggjakvøldið er missiónsmøti við Elsu Jacobsen og Absalon Matras.

Leygarmorgunin verður byrjað við bíbliutíma kl. 10. Kl. 16 verður møti við Øssur Kjølbro. Um kvøldið verður fyrst møti kl. 20, har Meinigheitskórið syngur, og síðani ungdómsmøti kl. 22.

Sunnudagin er familjumøti á skránni kl. 14. Ársmøtið endar við møti í Vesturkirkjuni kl. 17. Hetta møtið er skipað saman við Meinigheitshúsinum í Havn. Har talar aftur Hans Erik Nissen og Taborkórið syngur.



*Kalsoyingar hava nú bara tveir farmatúrar um vikuna. – Tað er óskiljandi, heldur Karsten Hansen*

# Kalsoyingar sparkaðir 100 ár aftur í tíðina

**Fólk á Kalsoynni sóu fram til dagin, tá nýggja ferjulegan á Syðradali varð tikin í nýtslu. Ferðasambandið er nú vorðið munandi betri, men tá talan er um farmin so er støðan tann sama sum hon var við Fyrra Heimsbardaga**

FERÐASAMBAND
*Snorri Brend*

Við nýggju ferjuleguni sleppa tey av oynni við bili fleiri ferðir um dagin.

Á henda hátt hava tey nú fingið ein møguleika at skipa sín gerandisdag sum øll onnur her á landi.

Men tá talan er um flutningin av farmi, so hevur framburðurin ikki fylgt við tíðini. Tí sambært tingmanninum, Karsten Hansen so eru farmatúrarnir til Kalsoynna skornir niður úr átta til einans tveir túrar um vikuna.

Frammanundan varð farmur fluttur til oynna fýra og fimm ferðir um vikuna, og gjarna tvær til tríggjar ferðir um dagin.

**Løgin sparing**

- Eg skilji ikki, hví ein hevur gjørt hetta. Tí hetta er nærum tað sama sum at sparka beinini undan møguleikanum fyri øllum framburði hjá kalsoyingum, sigur hann.

Orsøkin til hetta er møguliga sparing, heldur hann, uttan tó at kunna góðtaka eitt slíkt sjónarmið.

Hann hevur tí sett Jógvani við Keldu, landsstýrismanni ein fyrispurning um hví ein hevur skorið farmaflutningin til Kalsoynna so nógv niður.

– Tað er óskiljandi. Tað er ósømiligt. Tað kann snøgt sagt ikki góðtakast, at man so at siga eftir einari nátt broytir umstøðurnar hjá teimum, sum búleikast á Kalsoynmni.

- Hetta er ein so stór og øgvuslig broyting, at tey ikki uttan eykakostnað og tíð kunnu fáa tað, sum teimum tørvar í dagliga virki teirra, sigur Karsten Hansen í grundgevingum sínum.

# Havnaøkið á Sundi er nú skipað

**Fyrr var havnaøkið á Sundi bert ætlað sum vinnuøki. Nú er tað sundurbýtt til bæði at fevna um vinnuøki og havnaøki**

HAVNIR
*Snorri Brend*

Við teirri gomlu byggisamtyktini fyri økið var tað lagt av til vinnur, ið beinleiðis ella óbeinleiðis vóru fremjandi fyri føroyskan útflutning.

- Men hetta avmarkaði møguleikarnar at brúka økið, helt kommunan.

Tá økið er avlagt til vinnuøki, so kundu vinnur, sum ikki hava nakað samband við skipaferðslu og skiparakstur, eisini liggja á økinum.

- Hetta førir við sær, at vinnur sum hava tørv á at liggja á havnaøkinum, helst vórðu noyddar at fara á annað stað, tí havnaøkið varð brúkt til vinnuendamál, sum ikki høvdu tørv á at liggja beint har.

Nú er so eitt øki lagt av til havnaøki, har møguleikar eru fyri havnarakstri og goymslum í sambandi við skipaferðslu og til annað virksemi, sum hevur serliga stóran tørv á sjóvegis flutningi.

Á økinum liggur ein bóndagarður, og hann verður varðveittur har hann liggur, - nú við áseting av marki til hitt økið.

Í dag finst eisini eitt asfaltverk á tí ovara økinum. Hetta verður leigað frá kommununi.

# Jakob Lange í andróðri

Jakob Lange lestrarstjóri á Københavns Universitet er í hesum døgum í Føroyum og heldur fyrilestrar fyri ungum lesandi, um valmøguleikar innan hægri útbúgvingar í Danmark. Men í Danmark er hann komin í sera harðan andróður.

Sum lestrarstjóri hevur hann ábyrgd av upptøkuni á skúlan. Í ókeypis dagblaðnum URBAN, verður í dag avdúkað, at ein feilur hevur verið í upptøkuni av kvotu 2 næmingum á ítróttarlesturin. Í staðin fyri at taka tey best egnaðu, eru 20 tey verst egnaðu tikin inn. Tey varnaðust feilin ov seint, og høvdu longu boðað næmingunum frá. Tí varð avgjørt, at lata næmingarnar sleppa inn, og víðka lesturin soleiðis, at eisini tey best egnaðu sloppu inn. Hetta er sera dýrt fyri skúlan, tí í staðin fyri at hava fýra flokkar, hava tey nú fimm skrivar URBAN.

Jakob Lange sigur við URBAN, at hann harmast um feilin. Men hvørki Lange ella lestrarleiðarin á ítróttarútbúgvingini vilja siga hvussu nógvan pening hetta fer at kosta.

**-nud**